

*Avtalan um byggingina varð undirskrivað beint eftir fundin – vinstrumegn Jákup Suni Joensen frá Bulur í Signabø og borgarstjórin, Páll á Reynatúgvu*

# Sandsbørn fáa nýggjan skúla fyri jól



*Áhugin fyri málinum um barnaskúlan var stórur. Sjáldan munnu so mong hava lurtað eftir tí, sum teir fólkavaldu høvdu at bera fram*

**Bygdaráðið á Sandi samtykti í gjárkvøldið at taka við einum tilboði frá sp/f Bulur í Signabø um at byggja ein nýggjan barnaskúla. Hesin fer at kosta um 9 mió krónur, og kemur ístaðin fyri tann gamla skúlan sum varð bygdur í 1884. Fýra atkvøður vóru fyri uppskotinum men tríggjar ímóti!**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandur:** - Tað var uppá tíðina, at vit fingu ein nýggjan skúla, sigur ein manna av Sandi, og sum var ein av áhoyrarunum á bygdarráðsfundinum í gjárkvøldið.

Málið um barnaskúlan á Sandi hevur stóran áhuga millum bygdarfólkið, og hetta sást eisini aftur á fundinum í gjárkvøldið. Omanfyri 30 heimasandsfólk vóru á fundinum.

- Lærararnir hava verið sera tolnir, má eg siga. Høvdu fólk bara vitað, hvussu vánaligar umstøður vóru í skúlanum, so var skúlin langt síðani komin, sigur henda kvinnan.

Hon var ein av teimum, sum kundi fegnast um samtyktina at byggja tann nýggja skúlan, og sum skal standa liðugur 15. desember í ár.

Nýggi skúlin verður um 800 fermetrar til støddar og fer at liggja beint við ætlaða sparkivøllin á Sandi. Hann verður gjørdur í einari hædd við seks skúlastovum.

## Tvey uppskot

Bert eitt mál var á skránni til fundin í gjárkvøldið: Endalig støðutakan til barnaskúlan á Sandi.

Undir framløguni vísti borgarstjórin, Páll á Reynatúgvu á, at hetta var eitt gamalt mál. Undanfarna bygdarráðið vísti á staðið til eina plasering, og tað hevur hetta bygdarráðið so hildið fast við.

Í summar var farið undir eitt partalagssamstarv við byggifyritøkuna Articon og Selmar Nielsen, verkfrøðing um tann ætlaða skúlan, sum skuldi verða í tveimum hæddum.

- Tað vísti seg seinni, at